# VIÐMERKINGAR

SAMBAND
EIRIKUR LINDENSKOV
EIRIKUR@SOSIALURIN.FO
TLF 341800

## Latið meiniga føroyinginum seinasta triðingin

Nógvur rumbul hevur tikið seg upp í kjalarvørrinum á Føroya Bankasøluni. Men er sølan farin fram nógv øðrvísi enn Løgtingið samtykti 2. mai í fjør, soleiðis sum fleiri tinglimir nú geva okkum fatan av?

Løgtingssamtyktin sigur heilt greitt, at Føroya Banki skal skrásetast á Virðisbrævamarknaði Føroya, og at ein partur skal seljast bólki ella bólkum av fíggjarligum íleggjarum og restin privatum íleggjarum. Er tað ikki júst hetta, ið er hent, nú ein partur er seldur bólki ella bólkum av fíggjarligum íleggjarum og restin er seld privatum íleggjarum.

Vit mugu bara geva formannininum í Fíggingargrunninum rætt, tá hann sigur, at Fíggingargrunnurin hevur hildið seg til tann leistin, sum Løgtingið hevur skorið.

Í viðmerkingunum til Løgtingssamtyktina stendur eisini, at Fíggingargrunnurin skal úttvega sær fíggjarliga ráðgeving í samband við søluna. Er tað ikki eisini júst hetta Fíggingargrunnurin hevur gjørt, tá ið hann hevur fingið altjóða góðkenda Svenska Handilsbankan sum ráðgeva!
Við teimum altjóða royndunum Svenski Handilsbankin hevur innan økið, hava teir staðið fyri tí sokallaða søluprospektinum. Her stóð m.a., at av teimum tveimum triðingunum, sum vóru til sølu, fingu føroyskir fíggjarligir íleggjarar tillutað 40%, útlendskir fingu eisini tillutað 40%, og allir privatir vórðu koyrdir í ein bólk og fingu tillutað 20%.

Svenski Handilsbankin átti at havt tikið meira atlit til teir føroysku privatu íleggjararnar. Kanska hevur hann undirmett týdningin av hesum partinum, ella kanska er tað bara komið heilt óvart á hann, at áhugin her varð so stórur. Tað stóð greitt í prospektinum, at hesin privati bólkurin varð skorin pro-rata, um yvirteknað varð – og harvið bundu tey seg til at gera tað. Svenski Handilsbankin skuldi eftir okkara tykki ikki bundið seg til hetta, men tikið sær rætt til at tilgóðasággja føroyingar.

Aftaná søluna av Føroya Banka er tað kanska meira viðkomandi at spyrja, um løgtingslimir og her ikki minst samgongumeirilutin hava verið nóg búnir til at síggja, hvørjar fylgir teirra samtyktir hava, heldur enn at lasta Fíggingargrunnin fyri eitt vánaligt arbeiði.

Tað sær út til, at sølan er farin fram eftir Løgtingssamtyktini. Bert spell, at tann vanligi føroyingurin ikki fekk meira í part í fyrstu atløgu. Men tað almenna er framvegis nógv tann størsti partaeigarin í Føroya Banka, og tí kundu vit í næsta umfari tikið við læru av hesum og latið tann síðsta triðingin, sum eftir er, til tann meiniga føroyingin.

**Sosialurin**

## Hatta er ov bíligt – John Johannesen

**EGIN HENRIKSEN**



Nú at gráta rossatár yvir søluna av Føroya Banka, og harvið eisini tað vaksandi sosialu gjónna í Føroyum.

Er tann vanligi føroyingurin "reyvrendur", og tað er hann allarhelst, so hevur tú og restin av samgonguni fulla ábyrgd av hesum.

Samgongan undir javnaðarleiðslu hevur lítið annað gjørt enn at lívga teimum, ið høvdu ivaleyst frammanundan.

Tað byrjaði við, at Javnaðarflokkurin meldaði út, at "stættarstríðið var av" – uttan at siga fólki frá, hvør vann. Síðan komu skattalættarnir til tey vælbjargaðu, og sum um tað ikki var nóg mikið, bleiv tað loyvt at trekkja rentur av lánum til partabrævakeyp frá í skatti. Skal alt hetta ikki breiðka ta sosialu gjónna - gera munin millum rík og fátøk størri, so kann alt gera tað sama.

E.S. Nú mundi eg gloymt fiskivinnulóggávuna og orðið "kann". Hvussu var við hesum???. Var hetta málið ikki ógvuliga nær við eisini at "stinka."

## Ummæli av listaframsýningini "Post-modernisma í 21. øld" í Listaskálanum!

**HERI SIMONSEN**



Undirritaði var millum tey fáu útvaldu her á landi, sum fekk tann stóra forrætt at verða við til listaframsýningina "Post-modernisma í 21. øld". Talan var um eina 1-dagsframsýning har Listaskálin skygdi í blálýsi hendan morgunin.

Skundaði mær tí at skriva nøkur "diktat" um framsýningina! Tað vísti seg, at næstan øll "motivini" vóru svørt/hvít. Tó fór málningurin "framløga" totalt yvir í svart. Málningurin sum hongur best eftir í minninum var tann av Christian 4. kongi, hesin eitur: "Vi alene vide", og fylti hann rættuliga nógv í framsýningini. Í tí eina førinum var talan um ein sera koloristiskan málning, nevnliga motivið: "Upplestur". Motivið sum setti flest spor var málningurin: "munnkurv", hetta var ein ordans gysari-málningur! Listamaðurin hevur ein sera mono-logiskan sans, og trýr upp á egnan mátt og evnir, har tað sum málað verður er uttan feilir og lýti. Ein málningur hekk uppiyvir øllum hinum, og var tað motivið: "Sandur í Afrika".

So at siga øll motivini høvdu ein sera greiðan boðskap, tó ikki tann eini málningurin, sum var "addressuleysur". Men tað er ikki nakað, sum man skal reklamera fyri! Ein sera dramatisk framsýning, har tað klappaði væl!

## Rættarstøðan hjá menningartarnaðum

**NICOLINA WILLIAMSDÓTTIR**

476 Gjógv

Ja, nú hendi tað endiliga. Ljós varð aftur sett á støðuna hjá soni mínum Jørgin, og eg spyrji bara! "hendir nakað nú?"

Tøkk til Oyggjatíðindi, sum var einasta blað, ið viðgjørdi málið. Eitt skulu Føroya fólk vita, og tað er at hvørt orð sum skivað er í greinini í Oyggjatíðindi nr. ?? er satt.

Dan Klein hevur víst áhuga fyri okkum alla tíðina og við millumbilum nortið við málið. Hetta ímeðan tey, sum hava ábyrgd fyri øllum landsins borgarum, hava snorksovið!! Hvar er leiðarin fyri táverðandi Andveikavernd, sum meldaði málið til løgregluna fyri 18 árum síðani? Í mong ár hava vit hvørki sæð ella hoyrt nakað til hann. Fyri kortum vísti hann stóran áhuga fyri rættindunum hjá minnilutabólki og fekk lógina dagførda eftir stutta stund.
- Alt gott um tað, men mær tykir at hann hevur gloymt tey menningartarnaðu.
Sjey ár eru liðin síðani lógin varð dagførd í Danmark, men einki hendir her à landi.

Eg vil eisini takka Dánjali Højgaard úr Útvarpinum, fyri sýndan áhuga og Løgtingsins Umboðskvinnu fyri dygdargott arbeiði.

Livst so spyrst.


**Sosialurin**

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:** Jan Müller jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:** Eirikur Lindenskov eirikur@sosialurin.fo
**Redaktiónsleiðari:** Kári Mikkelsen karim@sosialurin.fo

**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
Jonhard Hammer jonhard@sosialurin.fo
Gudny Langgaard gudny@sosialurin.fo
Birgir Waag Høgnesen birgir@sosialurin.fo
Joan Abrahamsen joan@sosialurin.fo

**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Vilmund Jacobsen vilmund@sosialurin.fo
Snorri Brend snorri@sosialurin.fo
Magnus Gunnarsson maggi@sosialurin.fo
Rigmor Dam rigmor@sosialurin.fo
Rólant Waag Dam rolant@sosialurin.fo
Niels Uni Dam nielsuni@sosialurin.fo
Leo Poulsen leo@sosialurin.fo
Dorit Hansen dorit@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo

**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo
Teitur Joensen teitur@sosialurin.fo

**Myndamenn:**
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo

**Kykmyndir:**
Alvin Ellebye Andersen alvin@sosialurin.fo

**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo

**Sosialurin í Suðuroy:**
tel. 375364 fax 375464
tel. 228814
e-post: aki@sosialurin.fo
e-post: dagfinn@sosialurin.fo

**!!! Haldarar**
sum ikki hava fingið blaðið, kunnu ringja til 341818 og boða frá, leygardag tó frá kl. 11.00-13.00

**Uppseting/prent:**
Uppseting: Sosialurin
Prent: Prentmiðstøðin
**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin
**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Tórsgøta 1, 100 Tórshavn
Tel. 341800, Fax 341801
**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn
**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo
varp@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan 13.30

**Lýsingar**

| Freistir: | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Mánadagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Týsdagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Frí. kl. 09 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Støðd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39 mm og rúmið millum teigarnar er 4 mm.

**Innsent tilfar**
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.